Astri í Listaskálanum

Í dag, hósdagin klokkan 16, letur upp stakframsýning í Listaskálanum í Havn. Tað er Astri Luihn, sum vísir fram sína list, ið fyllir gamla skálan, forhøllina og pyramiduna innanfyri. Malan Marnersdóttir, nýtilnevndur professari, letur framsýningina upp, og

Petra Iversen syngur.

Astri Luihn sýnir fram 44 málningar, ið eru gjørdir á linoleumsplátur, har hon sker, málar og nýtir ymsar grafiskar teknikkir í eini og somu mynd.

Myndirnar hava støði í Brynhildartátti. Framsýningin er opin frá 27. mai til 18. juli 2004.

- hkm

Tosar um kjarnan

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri almennum fyrilestri í Ovastovu í kvøld, hóskvøld, klokkan 20. Tað er Einar Solheim, evnafrøðingur, sum heldur fyrilestur um nýggja stóra granskingarkjarnan í Bergen, sum kostaði eina milliard krónur og sum stóð liðugur í fjor.

Granskingarkjarnin PROBE, sum hann er nevndur, er ein brannýggjur tjóðar proteingranskingarkjarni við Universitetið í Bergen. Bygningurin hevur ta nýggjastu og mest framkomnu tøkniligu útgerðina, ið finst á marknaðinum. PROBE er figgjað av UiB og FUGE-ætlanini, (FUGE: Funksjonell Genomforskning) og fekk 20 milliónir norskar krónur játtaðar til keyp av útgerð. Kjarnin luttekur í altjóða samstarvsverkætlanum um proteingransking.

Einar Solheim, sum í løtuni hevur farloyvi frá 1. amanuensis-starvi á Instituttinum fyri Farmakologi, er starvsettur á PROBE. Hann fer í fyrilestri sínum at umtala henda granskingarkjarnan, tøkniligu framkomnu analysu-útgerðina og uppgávur, sum kjarnin dagliga arbeiðir við.

hkm

Seinasti fyrilesturin

Hóskvøldið tann 27. mei klokkan 19.30 verður almennur fyrilestur á Margarinfabrikkini. Fyrilesturin ber heitið Sjálvsmynd-Ímynd-Fyrimynd. Tað er Kári Leivsson, sálarfrøðingur, ið fer at greiða frá og hugleiða um sjálvsmynd, ímynd, og fyrimynd, sum hava nógv at týða í ungdómsárunum.

Fyrilesturin er ætlaður ungdómum, foreldrum, pedagogum, lærarum og øðrum áhugaðum. Fyrilesturin er ókeypis, og hann er tann seinasti fyrilesturin á Margarinfabrikkini áðrenn summarsteðgin.

- hkm

DJ-Show

Leygarkvøldið verður stórt DJ-Show við »DJ-Switch« í Eydnuni á Oyrarbakka.

– Tann besti Dj'arin í Føroyum í løtuni fer at pumpa húsið, siga fyrireikararnir. Skipað verður fyri ókeypis bussi úr Havn og úr Eysturoynni til tess at bøta um trygdina hjá teimum ungu, sum á náttartíð ferðast í privatbilum.

- hkm

Froskar í Eysturoynni

Mikudagin tann 26. mai, í gjár, varð nýtt froskmannafelag sett á stovn. Nýggja felagið heldur til í Eysturoynni, og tað eitur Eysturoyar Froskmannafelag.

Limir í Tórshavnar Froskmannafelag greiddu frá teirra virksemi á stovnandi aðalfundinum hjá Eysturoyar Froskmannafelag.

hkm

Høgni í Snarskivuni

Høgni W. Larsen letur í dag upp framsýning á Snarskivuni

Í dag, hósdagin, letur upp framsýning við vatnlitsmyndum hjá Høgna W. Larsen í forhøllini í Snarskivuni á Vaglinum í Havn. Seinastu árini hevur listamaðurin og arkitekturin Høgni W. Larsen serliga lagt seg eftir at mála býarmyndir og gøtumyndir úr Havnini.

– Eg haldi, at enn eiga vit fleiri vakrar gøtur í Havnini, sum kanska um nøkur fá ár eru farnar í søguna. Tað, sum eyðkennir hesar gøtur og ger tær livandi og spennandi, er fyrst og fremst allir litirnir og í góðum sólarljósi skuggaspælið á húsaveggjum og á smølu vegunum, sigur listamaðurin Høgni W. Larsen.

Tað er mentamáladeildin í Tórshavnar kommunu, sum skipar fyri listaframsýningini. Á framsýningini, sum letur upp í dag klokkan 16, hevur Høgni umleið 40 vatnlitamyndir í glasi og rammu. 25 myndir eru nýggjar og til sølu, og hinar eru ogn. Mest øll myndevnini eru býarmyndir og gøtumyndir úr Havn, men eisini eru nakrar náttúrumyndir úr Kvívík, Koltri og Gjógv, umframt fýra úr vísuni Vaagen.

Snarskivan, har framsýningin er, hevur opið frá mánadegi til fríggjadag frá klokkan 9 til klokkan 16, og hósdag til klokkan 18.

-hkm

Stovnar rockbólk í Danmark

Super Sonic: Frá vinstru Edmund Jacobsen, sang; Simon F. Melsen, guitar; Matthew Anyanwu, trummir; og Thomas Petersen, bass.

Mynd: Paul van Zijl

Edmund Jacobsen, best kendur sum sangari í Chase, hevur saman við øðrum stovnað bólkin Super Sonic. Nýggi bólkurin spælir rock av tí harða slagnum. Bólkar sum Black Sabbath, Soundgarden, Alice In Chains, Monster Magnet og

Audioslave hava givið íblástur til løgini hjá Super Sonic.

– Tann harði rockurin hevur altíð verði mín tónleikur. Eg havi roynt at skrivað pop og bleytari tónleik, men havi nú ásanna, at eg dugi best at skriva løg av tí buldruta slagnum. Tað er stuttligari, sigur Edmund Jacobsen.

Edmund hevur síðani 1992 verði búsitandi í Danmark, og hevur øll hesi árini verði virkin innan tónleik. Fyri tað mesta hevur hann spælt tónleik til veitslur og á smærri spælistøðum. Og nú vil hann aftur royna seg við egnum løgum saman við nýggja bólkinum, sum hevur heimstað í Esbjerg.

– Tað er ikki nøktandi bert at spæla tónleik, sum onnur hava gjørt. Eg havi altíð smíða løg, men havi mangla teir røttu tónleikarnar. Bólkurin Super Sonic er tann heilt rætti fyri meg, sigur Edmund Jacobsen.

Í løtuni er Super Sonic í venjingarhølunum fleiri ferðir um vikuna, og ætlanin er at innspæla eina stakfløgu seinni í ár. Bólkurin spælir fyrstu konsertina í Esbjerg tann 11. juni.

– Eg vóni, at tað verður møguligt at koma til Føroya at spæla innan alt ov langa tíð, sigur Edmund Jacobsen, stovnari av nýggjum rockbólki.

Tey flestu munnu kenna Edmund best sum sangara í bólkinum Chase, sum gav fløgur út í 1992 og 2001.

hkm

20 ár

Hvítusunnudag verður Fuglafjarðar kirkja 20 ár. Henda dagin verður hátíðargudstænasta klokkan 11 í kirkjuni. Fuglafjarðar Sangkór syngur, og sóknarpresturin, Uni Næs, prædikar. Seinnapartin hvítusunnudag klokkan 15 verður sanggudstænasta í kirkjuni. Kirkjukórið í Vestmanna kirkju syngur.

Grundarsteinurin til nýggju kirkjuna í Fuglafirði varð lagdur 12. juni 1983 og kirkjan varð vígd hvítusunnudag 10. juni 1984. Tað er danski arkitekturin Holger Jensen, sum hevur teknað kirkjuna, og Sveinbjørn á Horni, byggimeistari, stóð fyri arbeiðinum.

- hkm

OECD uppsangur til danska fólkaskúlan

Í seinastu viku varð nýggj OECD kanning almannakunngjørd, og úrslitið var ein skelkandi avdúking av, at danski fólkaskúlin hevur álvarsom sjúkueyðkenni og er eftirbátur á økinum í europeiskum høpi. Danska lærarafelagið stendur fyri skotum frá politikarum og serfrøðingum

KANNING

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

– Við hægri krøvum, fleiri royndum og meiri eftirmetingum skulu vit menna danska fólkaskúlan, sum er á alt ov lágum støði, sigur danski undirvísingarmálaráðharrin Ulla Tørnæs úr Venstre eftir avdúkandi OECD kanning

Mynd: Scanpix

Sum flestum kunnugt er danska fólkaskúlaskipanin galdandi í Føroyum, og tí er tað hugvekjandi fyri okkum føroyingar, at spildurnýggj OECD kanning avdúkar álvarsamar trupulleikar í danska fólkaskúlanum.

Eftir 10 ár sum bleyt millumvøra í altjóða kanningum kastaði danska blaðið Berlingske Tidende í seinastu viku ljós á trupulleikan, eftir at døpru úrslitini vórðu almannakunngjørd av OECD, sum er ein felagsskapur fyri figgjarligum og menningarligum arbeiði. Úrslitið av kanningini var, at Danmark er eftirbátur í europeiskum høpi hvat góðsku í fólkaskúlanum viðvíkur, og ein høvuðsniðurstøða er, at donsk børn eru sera illa fyri við vantandi fakligum førleika samanborið við restina av Europa. Lesið meiri um ítøkiligu sjúkueyðkennini í danska fólkaskúlanum aðrastaðni á síðuni í viðtalu, sum Berlingske Tidende hevur gjørt við danskan professara.

Kanada og Finland fremst

Fleiri positiv viðurskifti eru eisini at finna í danska skúlaverkinum sambært kanningini, men niðurstøðan er, at danska fólkaskúlaskipanin, sum vit eisini nýta í Føroyum, als ikki er nøktandi og er ikki á jøvnum føti við fólkaskúlan í teimum londum, Danmark vanliga samanber seg við.

Kanada og Finland vóru OECD londini við besta fólkaskúlanum, meðan danir endaðu mitt á listanum saman við meiri tilaftirskomnum londum og nakað aftanfyri onnur framkomin vælferðarsamfelog.

Kanningin um danska fólkaskúlaverkið byggir á granskingararbeiði hjá einum serfrøðingaliði undir OECD leiðslu við onglendinginum Peter Mortimore á odda. Mortimore er fyrrverandi stjóri á útbúgvingarskrivstovuni á University of London. Enska serfrøðingaliðið hevur vitjað og kannað danskar skúlar, stovnar, foreldur, lærarar, næmingar, kommunal-politikarar, landspolitikarar o.s.fr.

OECD rapportin um danska skúlaverkið skal viðgerast á ráðstevnu 9-10 juni í Keypmannahavn, har øll OECD londini luttaka. Umframt hetta verða lærarafeløgini og lands- og kommunalpolitikarar við á stevnuni. Ein møguleiki, føroysku myndugleikarnir skuldu umhugsa at luttikið á.

Lærarafelagið stendur fyri skotum

Undirvísingarmálaráðharrin úr Venstre, Ulla Tørnæs, er sera glað fyri kanningina, og hon vil beinanvegin kasta ljós á og betra um trupulleikarnar í danska skúlaverkinum. Hon vil innføra fleiri royndir, hægri krøv og fleiri eftirmetingar í fólkaskúlanum.

– Vit skulu hava fleiri diagnostiskar royndir í fólkaskúlanum, sum skulu vísa og avdúkað stoðið. Vit skulu innføra eina lesiroynd í 2. flokki, eina dansktroynd í 4. flokki og eina rokniroynd í 7. flokki, sigur undirvísingarmálaráðharrin Ulla Tørnæs, sum finst at danska lærarafelagnum fyri vantandi nýhugsan. Undirvísingarmálaráðharrin vil sostatt skapa eina nýggja evalueringsmentan.

Fleiri aðrir danskir politikarar og serfrøðingar hava tikið orðið í sambandi við nýggju kanningina, og serliga verður kanónin vend móti danska lærarafelagnum. Stóra fakfelagið verður lagt undir at vera stívt og tungt at dansa við, og hvassastu atfinningarnar higartil komu frá Louise Frevert úr Dansk Folkeparti.

– Høvuðsorsøkin til trupulleikarnar í danska fólkaskúlanum er danska lærarafelagið. Felagið er stívt og konservativt og forðar fyri eini og hvørjari menning. Limirnir og leiðslan tosa altíð um umstøður lærarans, men eg leggi líka í lærararnar, so leingi teir ikki fyrst og fremst hugsa um, hvat er best fyri næmingarnar, sigur Louise Frevert.

Danski fólkaskúlin fostrar analfabetar

– Ein stórur partur av donskum ungdómi eru funktionellir analfebatar eftir nýggju ára skúlagongd, fleiri og fleiri fáa serundirvísing, vit eru ódugnalig at integrera tilflytarar og vit duga als ikki at bróta niður sosiala arvin. Hetta sigur danski professarin á Danmarks Pædagogiske Universitet, Niels Egelund, eftir nýggju OECD kanningina

KANNING

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo



- Í løtuni lena donsku lærararnir seg afturá og siga, at børnini ikki kunnu læra nakað, tí tey koma frá sosialstætt nummar fimm, tí foreldrini ikki eru donsk, ella tí móðirin býr einsamøll, men hetta eru biligar undanførslur, sigur danski professarin Niels Egelund eftir nýggja OECD kanning

Mynd: Scanpix

Í seinastu viku var OECD kanningin um danska fólkaskúlan almannakunngjørd, og úrslitið hevur veruliga sett gongd á kjakið um lága stoðið og sjúkueyðkennini, danskir næmingar sambært kanningini líða undir. Ein, sum við egnum orðum hevur »rópt og skrála« í mong ár, er danski professarin á Danmarks Pædagogiske Universitet, Niels Egelund. Berlingske Tidende hevði eftir OECD kanningina prát við professaran, sum ikki sparir uppá krútið við at gagnrýna danska fólkaskúlan fyri at vera ov tungan at dansa við nýggjar tíðir og ov lítið fokusera á tað, sum hevur týdning í nútíðar samfelagnum.

Egelund er ikki einsamallur um at vera kritiskur móti danska fólkaskúlanum. Sambært danska professaranum eru fýra sjónligir og álvarsamir høvuðstrupulleikar í danska fólkaskúlanum, sum ikki eru at finna í eins stóran mun í grannalondunum hjá Danmark.

– Ein stórur partur av donsku børnunum eru funktionellir analfebatar eftir nýggju ára skúlagongd, fleiri og fleiri fáa serundirvísing, vit eru ódugnalig at integrera tilflytarar, og vit duga als ikki at bróta niður sosiala arvin, sigur Niels Egelund, sum í fleiri ár hevur funnist at donsku fólkaskúlaskipanini.

18% duga ikki at lesa

Hann heldur, at lyklaorðið fyri framgongd er stoðug evaluering (eftirmeting) og hægri krøv til næmingarnar. Við hægri krøvum og øktum eftirmetingum hevði undirvísingin sambært Niels Egelund verið tillaga hvørjum einstøkum næmingi sær.

– Úrslitið sambært OECD kanningini vísir, at 18% av donsku fólkaskúlanæmingunum duga ikki at lesa, tá teir fáa fólkaskúlaprógvið, og umframt hetta er øll vitan, upplýsing og kunning á einum ov vánaligum støði, slær professarin fast.

Hann heldur tað vera alneyðugt at fáa eina uppgerð í lag við donsku sjálvsfatanina av, at »vit eru so dugnalig og framkomin«, og metir Niels Egelund eitt høvuðseyðkenni í danska fólkaskúlanum vera reindyrkað leti (dovinskapur).

– Einki annað land í heiminum hevur fólkaskúlalærarar, sum nýta so lítla tíð saman við sínum næmingum. Donsku lærararnir hava árliga bert 6-700 tímar saman við børnunum, og tað er einfalt ov lítið, vísir professarin frá Danmarks Pædagogiske Universitet á. Víðari vísir Egelund á, at undanførslurnar als ikki halda.

– Donsku skúla-myndugleikarnir hava verið alt ov dovnir at seta krøv. Vit skulu seta krøv, sum noyðir allar næmingar at avrika maksimalt hvønn einasta dag í skúlanum, sigur Niels Egelund. Í løtuni lena lærararnir sambært professaranum seg afturá og siga, at børnini ikki kunnu læra nakað, tí tey koma frá sosialstætt nummar fimm, tí foreldrini ikki eru donsk, ella tí móðirin býr einsamøll.

– Hesin hugburður er ikki nøktandi, og tíðin er komin til evaluering av innsatsinum hjá bæði lærarum og næmingum í danska skúlaverkinum, slær Niels Egelund fast í kjalarvørrinum av avdúkandi OECD kanningini.

Í næstu útgávu verður roynd gjørd at fáa viðmerking frá føroysku myndugleikunum, tí sum kunnugt eru vit undir somu fólkaskúlaskipan sum danir. Um danskir fólkaskúlanæmingar eru so illa fyri, er áhugavert at vita, hvussu stendur til við føroyskum fólkaskúlanæmingum.

hís